Føroyska sjómanskirkjan:

# Hátíðarhelt 20 ára dagin



*Hans Jacob Joensen, bispur, helt eina sera áhugaverda røðu undir hátíðargudstænastuni í Glyvra kirkju. Aftanfyri hann síggjast Meinahard Bjartalíð, sum var við altarið, og Hjørdis Kjærgaard, nýggi sjómanspresturin í Hull*

*Mynd: Maria Olsen*

**Í sambandi við at føroyska sjómanskirkjan er farin út um 20 ára dagin, og at ein nýggjur sjómansprestur er settur í Hull, var ein hátíðargudstænasta hildin í Glyvra kirkju seinasta sunnudag**

HÁTÍÐARHALD
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Hátíðargudstænastan var klokkan 11 sunnumorgunin. Tey trý Meinhard Bjartalíð, prestur, Hans Jacob Joensen, bispur og nýggi sjómanspresturin í Hull, Hjørdis Kjærgaard høvdu gudstænastuna. Meinhard var við altarið, bispur helt eina sera áhugaverda røðu og Hjørdis helt prædikuna.

Ætlanin við hátíðargudstænastuni var fyri tað fyrsta at at varpa ljós á søguna hjá sjómanskirkjuni.

Í sambandi við gudstænastuna hevði sjómanskirkjan boðið fólki, ið vara av henni við. Henning Bøgesvang við konu, aðalskrivaranum í donsku sjómanskirkjuni við konu, umboðum fyri kirkjuráðunum og bønarhúsunum í Føroyum og umboðum fyri manningarfeløgini. Eisini vóru nøkur, sum hava verið úti fyri sjómanskirkjuna tilstaðar hendan dagin.

Jógvan Fríðriksson, formaður í nevndini fyri føroysku sjómanskirkjuni, sigur, at hetta er á fyrsta sinni, at tann føroyska sjómanskirkjan hevur goldið fyri ein prest.

– Vit hava fingið stuðul frá landinum til okkara virksemi, og tað kemur væl við, sigur hann fegin.

Onkur hevur havt hug til at undrast eitt sindur á, at føroyska sjómanskirkjan setur prest í Hull, men tað heldur Jógvan Fríðriksson als ikki vera so undrunarvert.

– Tað gerst alt meiri og meiri vanligt, at føroyingar fara til Onglands at nema sær útbúgving, og hartil skal ein møgulig komandi oljuvinna havast í huga. Og ikki at gloyma bondini, sum vórðu knýtt millum Føroyar og Ongland undir seinna veraldarbardaga, tá mong – kanska serliga nógvar kvinnur – giftust til Onglands, sigur Jógvan og leggur afturat, at føroyingar hava jú altíð siglt til Onglands.

– Aðalmálið hjá okkum er at taka okkum av teimum, sum koma í havn og so ta staðbundnu kirkjuna, sigur hann.



*Heilt nógv fólk vóru savnað í kirkjuni hesa hátíðarløtu. Føroyska sjómanskirkjan varð sett á stovn í Runavík í juli 1981, og tí var avgjørt at halda gudstænastuna í Glyvra kirkju*

*Mynd: Maria Olsen*

### Vitja Klaksvík og Viðareiði

Tá eitt tílíkt ferðalið kemur á fyrsta sinni til Føroya, vitja tey ofta fleiri støð. Mánadagin gekk leiðin hjá teimum í Norðoyggjar, har tey vitjaðu Klaksvík og Viðareiði.

Tey komu til Klaksvíkar mánamorgunin og steðgaðu hampuliga longi í kirkjuni, har Hans Eiler Hammer, prestur, tók ímóti. Síðani gekk leiðin til Viðareiðis í kirkjuna og í prestagarðin í Ónagerði, har Elsa Funding vísti teimum runt.

Jógvan Fríðriksson sigur, at valið fall á júst hesi støðini og hesar kirkjunar, tí at tað var hildið, at vera so vakurt.

– Harafturat eru hetta jú staðkent fyri okkum, sigur Jógvan Fríðriksson, sum sjálvur var prestur á Viðareiði og búsitandi í Ónagerði eitt tíðarskeið. Eisini Meinhard Bjartalíð hevur verið prestur á Viðareiði. Og Henning Bøgesvang var prestur í Klaksvík í mong ár. So hetta kann uttan iva sigast at vera sera staðkent fólk, sum vitjaði mánadagin.

Mánakvøldið fóru tey úr aftur Klaksvík, og týsdagin gekk leiðin av aftur landinum.



*Mánadagin var ferðaliðið og vitjaði Christianskirkjuna í Klaksvík. Seinni um dagin gekk leiðin til Viðareiðis, har Elsa Funding, prestur, tók ímóti og vísti teimum kirkjuna og prestagarðin*

*Mynd: Maria Olsen*



# Havnar Bio setir met




*- Havnar Bio setti met við hyggjaraskara í 2002, men í ár bendir alt á, at nýtt met verður sett, ikki minst orsakað av filmum sum Ringanna Harri og Matrix, sigur Jákup Eli Jacobsen, stjóri í P/F Bio*

**Ongantíð áður hevur hyggjaraskarin í stóru kykmyndahøllini í Havn verið størri, og umframt at Havnar Bio setti met í fjør, verður eftir øllum at døma nýtt met í 2003. – Ikki minst orsakað av, at stórfilmar sum Ringanna Harri og Matrix koma skjótari til landið, sigur Jákup Eli Jacobsen, stjóri í P/F Bio**

BIOGRAFUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

- Vit settu met í 2002, men tað skal okkurt ógvusligt henda, um vit ikki aftur í ár seta met! Soleiðis sigur stjórin í P/F Bio, Jákup Eli Jacobsen, um gongdina og alsamt vaksandi hugin hjá føroyingum at fara í biograf.

### Heimsfrumsýningar í Føroyum

Jákup Eli Jacobsen ynskir ikki at upplýsa ávís hagtøl um, hvussu nógvir kundar hava leitað sær oman í biografin seinasta árið, men leggur hann eina við, at talan hevur verið um størstu fjøldina nakrantíð, og at tvær høvuðsorsøkir burturav eru til hetta.

- Fyrst og fremst er orsøkin sjálvsagt, at fleiri av filminum í ár og í fjør hava verið rættiliga góðir stórfilmar, sum økja um hugin hjá fólki at fara í biograf, sigur Jákup Eli Jacobsen. Sum dømi nevnir hann Í hesum høpi filmarnar Ringanna Harri 2 og Matrix 2, men umframt góðu filmarnar vísir hann eisini á týdningin, at filmarnir í dag koma skjótari til Føroya enn áður.

- Vit hava havt fleiri heimsfrumsýningar í ár, og tað er av alstórum týdningi, at filmarnir á fyrsta sinni verða sýndir í Føroyum samstundis sum í londunum kring okkum, sigur stjórin í Havnar Bio. Hann vísir á, at um ein filmur kemur ov seint til Føroya, er hann longu innfluttur á DVD gjøgnum alnótina, umframt at fólk missa hugin, hava tey lisið ella hoyrt ov nógv um ein film uttanlands, sum langt um leingi verður sýndur í Føroyum og er farin av móta.

Á hesum øki eru Føroyar við avtalu tengdar at Danmark, sum í løtuni sýna stórfilmarnar sera skjótt, og tískil er talan sambært stjóranum um ein fyrimun hjá partafelagnum at vera knýtt at Danmark.

### Fleiri stórfilmar eftir

Sum gongdin er nú, verður met aftur sett í ár, ikki minst tá havt verður í huga, at fleiri stórfilmar eru á skránni áðrenn ársskiftið.

- Matrix 3 og Ringanna Harri 3 eru enn ikki sýndir, meðan størsti Disney filmurin nakrantíð, Finding Nemo, eisini verður at síggja í nærmastu framtíð, og tískil er tað næstan heilt vist, at nýtt met verður sett, sigur Jákup Eli Jacobsen.

Ein kundi hugsað sær, at talan júst var um mótsætta rák, nú fleiri og fleiri hava ognað sær parabolir við nógvum rásum og video, men hetta tykist ikki ávirka biografin.

- Fólk vilja heldur fara í biograf saman enn sita heima í støvuni, tí tað er jú ein heilt øðrvísi uppliving, og tískil tykist gongdin við alt fleiri rásum og møguleikum í húsarhaldinum ikki ávirka høga kundatalið í Havnar Bio, metir stjórin í P/F Bio at enda.

Í løtuni arbeiða trý fólk fulla tíð í biografinum í Havn, meðan 11 arbeiðsfólk tilsamans eru tengd at arbeiðsplássinum.

# Bíða eftir eykajáttan

**Landsverkføðingurin hevur biðið um eykajáttan til at betra um parkeringsviðurskiftini við flogvøllin. Einki svar er komið enn**

PARKERINGSVIÐURSKIFTI
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Bíðað verður eftir pengum til at víðka um parkeringplássini við flogvøllin í Vágum.

Oyvindur Bromnes, landsverkfrøðingur, sigur, at søkt er um at fáa einar 500.000,- krónur á eykajáttanarlógini, sum er á veg. Men enn er einki svar komið.

Hann sigur at fyri hesar pengarnar kunnu gerast eini 40 - 50 parkeringspláss aftur at teimum verandi. Tað hevði hjálpt væl upp á støðuna, hóast tað ikki er í námind av teirri ætlanini, sum fyrr hevur verið frammi.

Hóast nakað væl er liðið út á árið, væntar landsverkfrøðingurin, at tað ber til at gera hetta arbeiðið í ár, um pengarnir verða játtaðir nú beinanveg.

Tað er nakað trongligt, sum er við flogvøllin, og hóast nýggj parkeringsskipan varð sett í verk herfyi, eru ikki øll, sum halda, at tað er nóg gott enn.

Líkt er til, at fólk ikki hava hug at gjalda fyri at lata bilin standa við flogvøllin. Og tey plássini, har gjald ikki verður tikið, eru tíðaravmarkað, so har ber heldur ikki til at lata bilin standa, um ein eitt nú ætla sær av landinum ella kanska skal til arbeiðis á flogvøllinum. Tað ger so, at onkur framvegis bókstaviliga setir bilin »við síðuna av« vegnum.



*Parkeringin við flogvøllin hevur mangan verið rættiliga tilvildarlig*

### Eisini til Gásadals

Landsverkfrøðingurin hevur eisini søkt um eykajáttan til tunnilin til Gásadals, sigur Oyvindur Brimnes. Men heldur ikki her ber til at siga í løtuni, hvussu úrslitið verður.

Tað er nakað væl eftir at gera í samband við tunnilsgerðina til Gásadals. Loftið er um at vera liðugt tryggjað. Men vegurin bæði inni í tunlinum og oman til Gásadals er eftir at gera. Portalarnir báðumegin skulu gerast, og øll trygdarútgerðin, sum skal vera í tunlinum, skal fáa til vega.

Oyvindur Brimnes sigur, at hetta er ikki nakað, sum verður gjørt liðugt í ár. Langt frá tí. Og hvussu verður næsta ár, veit hann heldur ikki.

– Her er talan um upphædd upp á nakrar milliónir, sum brúkast skulu enn, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.